Skálavegur 194 - FO-480 Skála
Tlf. 441368 – Fax 441360
Skúlaleiðarin telefon 442118 far.tlf 586005
E-mail: skalask@post.olivant.fo
http://www.skulin.fo/ska/index.htm

## Fyri lærara í sjúkrafarloyvi

verður søkt eftir lærara frá **25. mars til 27. juni 2008.**

Viðkomandi kemur at undirvísa 24 tímar:
2. flokki støddfrøði (6 t)
6.-7. flokki donskum (4 t)
3.-4.-5. flokki handverk og list (4 t)
og 10 tímar við fjølbrekaðum næmingi.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 31. mars.**

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Hans Jákup Andreasen á tlf. 442118 ella 586005.

Eisini ber til at senda teldupost til skúlan.

### Skála skúli

*Skála skúli er ein 5. flokkaður skúli við undirvísing í 1.-7. árgang. Komandi skúlaár verða 9 lærarar og 70 næmingar.*

### Ársaðalfundur
hjá P/F Smyril Line

Boðað verður við hesum til ársaðalfund í P/F Smyril Line (reg. nr. 544)
**mikudagin 9. apríl 2008 kl. 16:00**
at verða á Hotel Føroyum, við Oyggjavegin 45, 100 Tórshavn, við hesi dagsskrá:

0. Val av fundarstjóra.
1. Frásøgn frá virki felagsins í farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar.
3. Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlopið skal verða nýtt ella um rindan av halli sambært góðkenda roknskap.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðara.
6. Uppskot frá nevnd ella parteigarum um nakað er.

Roknskapur til aðalfundin liggur frammi á skrivstovu felagsins 8 dagar undan aðalfundinum.

Til at greiða atkvøðu á aðalfundinum krevst, at partaeigarin í seinasta lagi **mánadagin 7. apríl 2008** hevur prógvað sín atkvøðurætt á skrivstovu felagsins J. Broncksgøta 37, 100 Tórshavn.

P/F Smyril Line
**NEVNDIN**

## Skrivari til Vestmanna Kommunu

Søkt verður eftir skrivara til Vestmanna Kommunu at byrja **01. mai 2008** ella skjótast gjørligt. Skrivarin hevur dagligu leiðsluna av umsitingini og øllum viðurskiftum í kommununi. Talan er um eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Arbeiðsuppgávur:**
- leiðari av umsitingini
- skrivari hjá bygdarráðnum og nevndum
- samskifti við myndugleikar, borgarar o.o.
- kunning, m.a. tilfar til heimasíðu
- journalisering
- fíggjarviðurskiftir
- aðrar skrivstovuuppgávur

Søkt verður eftir einum persóni við hollum fakligum førleika og royndum. Kunnleiki til almenna fyrisiting og leiðslu hevur stóran týdning eins og góð samstarvsevni. Skrivarin hevur beinleiðis tilvísing til borgarstjóran.

Lønin verður latin eftir førleika og royndum.

Í Vestmanna Kommunu starvast 3 fólk í umsitingini. Arbeiðið er sera fjølbroytt og møguleiki er fyri eftirútbúgving og skeiðum.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 470110, ella Karl A. Olsen, borgarstjóra, tlf. 230114.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum og ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. mars 2008.

**Vestmanna Kommuna**
Bakkavegur 16
Postboks 91
FO-350 Vestmanna

## Húsalánsgrunnurin
Yviri við Strond 6 · Postsmoga 215 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 45 83 · Telefax 31 71 85 · e-mail: huslgr@post.olivant.fo

### *Til Sølu:*

Sethús í Vági:
Byggiár:
1933
Grundøkið:
414 m$^2$

Kjallarahædd:
Óinrættað

Stovuhædd:
47,40 m$^2$, 2 stovur, 1 køkur, gangur og trappuhol

Loftshædd:
47,40 m$^2$, 4 kømur, baðirúm, gangur og trappuhol

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Húsalánsgrunnin, tlf. 31 45 83**



## VÁGA FLOGHAVN

### Sløkkiliðsfólk (avloysarastørv)

Søkt verður eftir 3 sløkkiliðsfólkum til avloysarastørv frá 1. mai til 31. oktobur 2008. Møguleiki er vantandi fyri føstum starvi.

**Uppgávur:**
Uppgávurnar fevna m.a. um:
- Brand- og bjargingartænasta
- Sjóbjargingartænasta
- Trygdareftirlit (Security)
- Annað fyrikomandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
- Koyrikort til lastbilar, ella hevur tikið koyrikort innan 3 mánaðar eftir, at tú er sett/settur í starv
- Hevur góðar samstarvsførleikar og er fyrikomandi
- Kunnelika til enskt og teldu á brúkarastøði
- Hevur førleika at málbera teg í skrivt og talu, herundir at skriva frágreiðingar
- Sýnsváttan til trygdareftirlitsfólk
- Heilsuváttan til sløkkiliðsmenn
- Revsiváttan frá politinum

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv við mongum ymiskum uppgávum.
Setanin verður sum "tænastumannalíknandi setan".
Lønin er sambært lønarflokki 14 í sáttmála við HK-Trafik og Jernbane.

**Vit ynskja, at bæði kvinnur og menn søkja størvini.**

Skrivlig umsókn verður at senda til Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur.

Umsókn við møguligum prógvum o.ø. skulu verða okkum í hendi áðrenn hósdagin **27. mars klokkan 12.00**

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Ortind á telefon 354400 og Finnboga Niclasen á telefon 354400/354402

Vága Floghavn er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur til endamál at reka Vága Floghavn. Í løtuni verður arbeitt við at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í eitt partafelag.

Sosialurin
www.sosialurin.fo